

**Kim:** Eg veit ikki heilt, um tað er turnoff við silikonboppum.
**Terji:** Jú, tað at tú veit, at tað er sovorðið innanfyri, tað haldi eg er eitt sindur soleiðis ..
**Høgni:** Við push-up so skal tað jú heldur ikki verða soleiðis, at tá tú tekur bróstahaldaran av, fer teppið niður, áðrenn leikurin er byrjaður. Og eg haldi, at tað er syndarligt við hesum operatiónunum.
**Kim:** Tað er kanska ljótt við hesum arrunum. Men hinvegin, tá eg komi í pensjónsaldurin, so havi eg einki ímóti, at tað er gjørt eitt sindur við boppurnar, kanska strammaðar upp eitt sindur.
**Høgni:** Men alt við máta! Tað er eingin meining í at sita sum 60 ára gomul við ovurstórum ballónum.
**Terji:** Men hetta við silikon og sovorðnum. Kanska eru vit bara ov gamlir. Ein 20 ára gamal hevði kanska sagt okkurt annað. Eg kenni eina gentu, sum vildi vera pornostjørna, so hon fekk sær formar



eftir »idealunum«. So skuldu vit føla áðrenn og aftaná, men eg má siga, at tær vóru betri áðrenn!

## 8. Hvussu nógv brúka tit bróstini, meðan tit elskast ?

**Terji:** Nógv!
**Høgni:** Ja, øgiliga nógv!
**Terji:** Eisini tá vit ikki elskast. At liggja og leggja høvdið innat, tá man liggur á sofuni og slappar av. Tað er fantastiskt.
**Høgni:** Tað er himmalska deiligt.
**Kim:** Tað eru eisini nógvir góðir stillingar til, og tá kunnu tær brúkast nógv.
**Terji:** Ja, har eru nógvir møguleikar.

## 9. Finnast vánaligar boppur?

**Allir:** Ja!
**Terji:** Ja, sum tá rondin rundanum bróstvørtuna er ov stór. Eisini tær líkjast einum sokki við einum tennisbólti í.
**Høgni:** Ja, tað er ikki tað ideella.
**Terji:** Men vissi hon hevur átt børn, so mugu tær gjarna hanga eitt sindur. Og sjálvt um onnur blívur størri, og sindur av muni er á, so ger tað einki.
**Kim:** Tað er kanska meira konufólk, sum ganga upp í tað.

## 10. Í hvørjum klæðum rigga boppur best?

**Terji:** Uttan!
**Kim:** Tað veldst um, hvat fetish man er til.
**Høgni:** Tað er fullkomiliga vónleyst at tosa um. Men tað veldst nógv um umstøðurnar. Til dømis í haganum og hon er í morreyðari troyggju – tað er veldigt.
**Terji:** Hon skal ikki vera í bróstahaldara. Hann skal vekk sum skjótast. Tað finst eingin bróstahaldarafetish.
**Høgni:** Men trussur hava nógv at siga.
**Kim:** Ja, tað haldi eg eisini, tær hava nógv at siga.

## 11. Hvussu er við boppum í føroyskum klæðum?

**Terji:** Heilt fantastiskt.
**Høgni:** Ja tað er ótrúligt.
**Terji:** Tað er meira estetiskt og ótrúliga pent.
**Høgni:** Tað er vakurleiki, sum tú hevur virðing fyri.
**Kim:** Ah! Tað avhongur nokk av, hvussu tjóðskaparligur, tú ert.

> So er bara at velja:
> Boppa, barmur, bringa, bróst, buppa, bubba, boyur, bóltar, bananir, konubróst, júgur, kultur, kusa, snoppa, snubba, spini, stálmi, vørta, nøtir, hondtøk, forlyktir, melónir, vimplar, spejlegg, gajol, rosinur, rullugardinur, airbags, pattir, kúlur, eygu, kanaljur, knetti, frikadellur, vaskibretti, kanónir, lanternur, gazongas, heingipartí, perur, russaraboyur, mjólkafabrikk, meiarí, appilsinir, buglur, modeltok, stór lungu, skibakkar.

**Høgni:** Jú, tað rúmar absolutt seksualiteti.
**Terji:** Ja, at hála ketuna úr føroysku klæðunum, og »lata pakkan upp«, tað er fantastiskt.

## 12. Hvussu hava tit tað við eldri boppum?

**Terji:** Tær eru okey.
**Kim:** Trúgvi, at vit menn dáma væl ungar damur. Tær hava nakað serligt yvir sær.
**Terji:** Men tað ger onki, at man sær, at tær hava givið lívið víðari.
**Høgni:** Tað eru konufólk, sum hava fínar boppur, hóast tær eru eldri.
**Kim:** Tað er eisini nakað við, hvussu tær føla seg.
**Høgni:** Ja, gongulagið hevur nógv at siga. Hvussu tær bera seg og hvat tær útstrála.

## 13. Hvat halda tit um piercingar í boppunum?

**Terji:** Nei, tað veit eg ikki.
**Høgni:** Nei ...
**Kim:** Tað er ikki akkurát nakað, sum eg eri villur eftir.
**Terji:** Eg havi roynt at verið saman við einari, sum hevði piercing í boppunum. Men tað er ikki nakað, sum gevur eitt eyka kick.
**Kim:** Nei, tað er tað ikki. Men tað eru nøkur, sum dáma tað væl.
**Terji:** Kanska eru vit for gamlir. Ja, tað eru vit sikkurt. Høvdu vit havt ein ungan mann millum okkum, so hevði tað verið nakað heilt annað.

## 14. Hvussu nógv hava boppurnar at siga í mun til restina av útsjóndini?

**Terji:** Næstmest!
**Høgni:** Í mun til útsjóndina hava tær nógv størri týdning fyri kvinnurnar, enn fyri okkum.
**Kim:** Er tað reyvin, tú hugsar um?
**Terji:** Ja. Reyvin er absolutt á fyrsta plássi. Men tað skal vera symmetriskt.
**Kim:** Mær dámar væl stórar boppur, men tað má vera javnvág í. Ikki sum nógvar pornomodellir, har boppurnar er fullkomiliga asymmetriskar.

## 15. Hvat er besta boppuveðrið?

**Høgni:** Tað eru teir lumpisligu summardagarnir, tá øll blíva forkølað. Tá sólin lokkar genturnar at lata seg tunt í, og tað er kaldari, enn man heldur, so vørturnar standa fram.
**Kim:** Ein vakur dagur sum í dag fær alt at vakna, eisini okkum menn. Teir góðu várdagarnir, tá sólin skínur, klæðini lætna og lív kemur í alt aftur.

## 16. Hvør er so niðurstøðan hjá tykkum?

**Terji:** Vissi vit skulu siga nakað í felag, so verður tað…
**Høgni:** ..vistfrøðiligar boppur, takk! Silikon brúkar man, tá man umvælir húsini.
**Terji:** Ja, vistfrøðiligar boppur eru best.
**Kim:** ja…

*Orð: Røgvi Nybo*
*Myndir: Jens Kristian Vang, Polfoto*